# Flux til Grønlands

**Føroyski rockbólkurin er biðin um at koma at spæla á tónleikafestivali**

TÓNLEIKUR
*Eyðun Klakstein*

Mikudagin fór føroyski tónleikabólkurin Flux til Grønlands, har hann er biðin um at koma at spæla.

Flux var í Grønlandi á páskum, tá teir spældu á konsert har. Hesaferð eru teir bidnir um at koma at spæla á einum størri festivali, har bólkar úr fleiri londum eru við. Millum bólkarnar eru tveir úr Kanada.

Tiltakið, sum Flux er biðið um at luttaka á hesaferð, er munandi størri enn tað, sum teir vóru við í á páskum, og tí gleddu teir seg undan fráferðini til framførsluna.

Flux hitaði farna vikuskiftið upp við trimum konsertum í Klaksvík og í Havn. Tvær konsertir vóru á skránni í Atlantis í Klaksvík fríggjakvøldið, og leygarkvøldið spældi bólkurin í Havn.



*Flux er í hesum døgum í Grønlandi, har bólkurin skal spæla á stórum tónleikafestivali*
*Mynd: Jens Kristian Vang*

### Egnan rock

Flux spælir rocktónleik, sum teir gera sjálvir. Bólkurin er úr Eysturoynni og hevur farnu árini millum annað gjørt vart við seg í Prix Føroyar kappingunum.

Annað árið á rað var bólkurin í finaluni í ár, og hóast teir ikki vunnu fram millum tríggjar teir fremstu bólkarnar, so var framførslan góð.

Síðani finaluna hevur bólkurin skrivað nýggjar sangir, og teir hava eisini fingið nýggjan gittarspælara við í bólkin.

## VEÐRIÐ



Petur Skeel Jacobsen, veðurfrøðingur greiðir frá um veðrið




**Veðrið í dag:**
Gul til stívt andøvsgul av útnyrðingi, minkandi niður í lot av ymsum ættum. Yvirhøvur turt og sólglottar og hitin millum 8 og 11 stig.




**Veðrið leygardagin:**
Hann veksur vindin upp í hvassan vind ella skrið av landsynningi og regn og mjørki. Móti kvøldi andøvsgul av útsynningi og ælingur. Hitin millum 12 og 15 stig.




**Veðrið sunnudagin:**
Stívt andøvsgul upp í hvassan vind av norði og ælingur, men eisini sólglottar. Hitin millum 9 og 12 stig.

**Veðrið mánadagin og týsdagin:**
Upp í hvassan vind av norði og ælingur, týsdagin minni vindur og yvirhøvur turt. Hitin millum 5 og 9 stig.

### Hitalagið kring knøttin

| | |
|---|---|
| Illulisat | 10 |
| Nuuk | 10 |
| Qaqortoq | 8 |
| Ammassalik | 10 |
| Saint John's | – |
| Halifax | – |
| Reykjavík | 13 |
| Seyðisfjørður | 7 |
| Tórshavn | 14 |
| Lerwick | 13 |
| Aberdeen | 18 |
| London | 21 |
| Tromsø | 10 |
| Bergen | 15 |
| Oslo | – |
| Stokkhólm | 19 |
| Keypmannah. | 18 |
| Helsinki | 17 |
| Moskva | 14 |
| Berlin | 18 |
| Warzawa | 15 |
| Kiev | 12 |
| Bukarest | 21 |
| Paris | 23 |
| Madrid | 25 |
| Róm | 28 |
| Malorca | 30 |
| Athen | 32 |
| Malta | 30 |
| Tunis | 36 |
| Beijing | 30 |
| New Dehli | 32 |
| Bangkok | 31 |
| Jakarta | 33 |
| Sydney | 15 |
| New York | 27 |
| Miami | 30 |
| Los Angeles | 21 |
| Meksikobýur | – |
| Panama | – |
| La Paz | 14 |
| Rio de Janeiro | – |
| Buenos Aires | 19 |

### LUFTTRÝSTIÐ




Eitt lágtrýst, 1002 hPa. sunnan fyri Hvarvið fer móti Íslandi og dýpist.




Lágtrýstið vestan fyri Ísland fer spakuliga eystureftir og brúgvalagið haðani verður yvir Føroyum leygarmorgunin.

### HITALAGIÐ




Hitalagið mált frá 29/08 kl. 06⁰⁰– 30/08 kl. 06⁰⁰. Hitin í gjár: 12,2°
Minsti hiti máldur í aug.: 0,2° Mesti hiti máldur í aug.: 22,0°

### AVFALLIÐ




Avfallið: 2,0 mm – mált frá 29/08 kl. 06⁰⁰– 30/08 kl. 06⁰⁰
Avfallið higartil í aug.: 134,3 mm

### VESTFALLSKYRRINDI

25. august: Fyrra kvarter
1. september: Mánin longst frá jørðini
2. september: Fullmáni

Kelda. Álmanakkin 2001

| Dagur | Suðuroyar-/ Vágafirði fp. | Suðuroyar-/ Vágafirði sp. | Skúvoyar-/ Skopunarfirði fp. | Skúvoyar-/ Skopunarfirði sp. | Hestfirði/ Sundalagnum fp. | Hestfirði/ Sundalagnum sp. | Vestmannasundi fp. | Vestmannasundi sp. | Mykinesfirði fp. | Mykinesfirði sp. | Nólsoyarfirði fp. | Nólsoyarfirði sp. | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp. | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi sp. | Leirvíksfirði/ Haraldssundi fp. | Leirvíksfirði/ Haraldssundi sp. | Kalsoyar-/ Svínoyarfirði fp. | Kalsoyar-/ Svínoyarfirði sp. | Hvannasundi fp. | Hvannasundi sp. | Fugloyarfirði fp. | Fugloyarfirði sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 31. aug | 05.52 | 18.15 | 04.52 | 17.15 | 05.07 | 17.30 | 07.52 | 20.15 | 08.52 | 21.15 | 04.07 | 16.30 | 03.07 | 15.30 | 06.07 | 18.30 | 07.07 | 19.30 | 05.37 | 18.00 | 06.52 | 19.15 |
| 1. sep | 06.38 | 19.00 | 05.38 | 18.00 | 05.53 | 18.15 | 08.38 | 21.00 | 09.38 | 22.00 | 04.53 | 17.15 | 03.53 | 16.15 | 06.53 | 19.15 | 07.53 | 20.15 | 06.23 | 18.45 | 07.38 | 20.00 |
| 2. sep | 07.23 | 19.41 | 06.23 | 18.41 | 06.38 | 18.56 | 09.23 | 21.41 | 10.23 | 22.41 | 05.38 | 17.56 | 04.38 | 16.56 | 07.38 | 19.56 | 08.38 | 20.56 | 07.08 | 19.26 | 08.23 | 20.41 |
| 3. sep | 07.59 | 20.17 | 06.59 | 19.17 | 07.14 | 19.32 | 09.59 | 22.17 | 10.59 | 23.17 | 06.14 | 18.32 | 05.14 | 17.32 | 08.14 | 20.32 | 09.14 | 21.32 | 07.44 | 20.02 | 08.59 | 21.17 |

GEVIÐ BLÓÐ
BLÓÐBANKIN
Telefon 311397

HESTPRENT Spf.
...hvør sigur at vit eru sum onnur?
Dvørgastígur 7
100 Tórshavn
tel 31 45 55
fax 31 80 26
hestoy@hestprent.fo